## Rooney vil altíð spæla

Wayne Rooney var alt annað nøgdur, tá hann varð skiftur út í 1-0 sigrinum hjá United móti Besiktas fyrrakvøldið, men tað tykist tó ikki nerva venjara hansara, Alex Ferguson. – Hann er ongan tíð fegin um at verða skiftur út. Hann hevur somikið nógva orku, og hann vil altíð sleppa at spæla. Men hann hevði spælt einsamallur framherji í ein tíma, og tí valdi eg at skifta hann út, segði Alex Ferguson við ensku miðlarnar, sum vildu skapa eina gølu burtur úr hendingini.



## Laudrup til Grikkaland

Eftir at griska stórfelagið, Olympiakos gav Temuri Ketsbaia, sum fekk sekkin eftir bara tvey umfør í griksku liguni, er Michael Laudrup ein av høvuðskandidatunum til venjarastarvið. Sambært griskum sjónvarpi er Michael Laudrup ein av fýra høvuðskandidatum til starvið. Laudrup hevur áður verið settur í samband við venjarastarv í Grikkalandi, men ta ferðina valdi hann at taka av tilboðnum frá Spartak Moskva.

B68

KÍ

**Hóast næstan øll vón hjá KÍ var burtur, svam liðið við Hjalgrími Elttør á odda nakrar favnar ímóti vatnskorpuni, tá teir vitjaðu á Toftum í gjár. B68 kann hinvegin iðra seg, at felagið ikki fekk meira burturúr**




Eirikur í Jákupsstovu



Tað, sum líktist einum knock-out í Fuglafirði, var kanska bara ein knock-down. Enn standa klaksvíkingar í øllum førum á beinunum, og við sigrinum á Svangaskarði hava teir nú svarað aftur í niðurflytingarstríðnum

Mynd: Álvur Haraldsen

B68-KÍ 0-1 (0-1)

# KÍ svimur enn

Leygardagin var allur møguleiki hjá KÍ at yvirliva í bestu deildini avlívaður av miðlunum. Tað sá og sær framvegis sera torført út hjá klaksvíkingum at yvirliva í deildini, men sum úrslitini háttaðu sær í gjár, hevur KÍ framvegis møguleika at yvirliva, nú teir eru trý stig aftanfyri B36. Helst ikki tað tey flestu væntaðu eftir dystin leygardagin ímóti ÍF.

B68 var hinvegin nærmasti kappingarneyti hjá HB um meistaraheitið, hóast tey á Toftum helst hava vant seg við tankan, at megna tey at vera best av taparunum og fáa silvur, so er árið meira enn góðtikið.

### KÍ allastaðni

Útiliðið legði út sum eitt óløgi. Og nógvar broytingar vóru gjørdar síðan seinasta dys. Heðin á Lakjuni var fluttur niðan á vinstra vong, Kristoffur Jakobsen var komin inn á høgra vong og Hjalgrím Elttør spældi í fríum leikluti frammanfyri miðvøllin.

Hetta vísti seg at rigga væl, tí stórt trýst var á B68 málið fyrstu løtuna.

Tað gav eisini úrslit. Eftir fleiri hálvar møguleikar sprakk bólturin útfrá og ímóti Hjalgrím Elttør. Hjalgrím gjørdi skjótt av og smekkaði bóltin ímóti málinum, og umvegis ein B68 leikara fór bólturin í málið.

### B68 fyri rest

Restina av fyrra hálvleiki sat B68 á øllum, og serliga Jóhan Dávur Højgaard kann iðra seg um, at hann úr fimm metrum púra ódekkaður megnaði at skjóta bóltin tveir metrar upp um, eftir at Keita vísti stórspæl.

B68 hevði bóltin øgiliga nógv, og kom til fleiri hálvar møguleikar, men onkursvegna manglaðu avgerandi loysnirnar í avgerandi løtunum.

Aftur ímót dúvaði KÍ mest upp á skjótálop.

Tann største møguleikan fekk málskjúttin. Eftir skjótt elegant og beinleiðis álopsspæl, bleiv Hjalgrím Elttør púra leysur, men púra einsamallur við Vlada Filopovic megnaði var hann ikki kaldur nokk og skeyt bæði upp um og við síðurnarav.

### Nógv fólk fram

Í seinna hálvleiki var myndin tann sama. KÍ stríddist manniliga, men tað var B68, sum var spælstýrandi.

Nú byrjaði tolið hjá Bill Mcleod Jacobsen at ganga undan, og tað hevði millum annað við sær, at Pól Jóhannus Justinussen varð fluttur fram á vøllin, so B68 hevði tríggjar leikarar í verjuni.

Hetta gjørdi bara myndina av dystinum sterkari. B68 við bóltinum og KÍ við skjótálopum.

### Rok

Sum dysturin leið løgu KÍ leikararnir meira og meira. Hetta hildu B68 leikararnir lítið um og tað hevði fleiri smábardagar við sær.

Serliga Ahmet Keita og Jan Andreasen vóru í miðdeplinum í fleiri førum, og øll kring B68 hildu sera lítið um, at KÍ leikarar løgu heldur longi, tá onkur snuddur kom fyri.

Úrslitið merkir, at KÍ framvegis er undir, men at liðið hevur tikið eitt risatak ímóti vatnskorpuni. Fyri B68 merkir úrslitið, at nú er silvur hægsta vónin hjá B68.

## Mugu hava armarnar niður

Petur Mohr, venjari hjá KÍ, var sera fegin eftir sigurin á B68.

- Eg hugsi bara um dystin i dag. Vit eru øgiliga glaðir, men nú skulu vit hava armarnar niður, áðrenn dystin ímóti 07 Vestur sunnudagin, sigur Petur Mohr.

Hann leggur afturat, at teir mugu taka sunnudagin fyrst, og síðan taka tað harfrá.

Spurdur um tað ikki verður ein tungur burður at bjarga KÍ, staðfestir Petur Mohr, at tað verður torført, tí onnur lið mugu missa stig, um KÍ skal hava nakran møguleika.

**- eij**

## Fimm leikarar merkjast

Øssur Hansen hevur ikki spælt í eina rúgvu av dystum, og aftur í gjár sat hann uttanfyri. At hann og nógvir aðrir mangla, heldur hann merkja spælið.

- Vit hava havt nøkulunda teir somu ellivu á vøllinum gjøgnum árið, og vit síggja í dag, at tað ikki koyrir optimalt, nú vit hava fimm leikarar uttanfyri, sigur Øssur Hansen.

Hann harmast somuleiðis, at tað nú ikki ber til á nakran hátt ber til at fáa HB aftur, hóast teir ikki roknaðu við, at HB fór at snáva.

Um restina av kappingarárinum staðfestir Øssur Hansen, at árið er bjargað, um tað eydnast at fáa heiðursmerki.

**- eij**